# Ókeypis parkering til Prius




Toyota hava tikið eitt óvanligt stig fyri at vekja áhugan fyri umhvørvisvinarligum bilum við at leiga nøkur av teimum mest eftirspurdu og sentralu parkeringsplássunum í Keypmannahavn og reserverað tey til eigarar av hybridbilunum Toyota Prius.

Vit vilja við hesum røkja teir kundar, sum hava valt at koyra í einum av heimsins mest umhvørvisvinarligu bilum, sigur René Mouritsen, kunningarstjóri hjá Toyota Danmark.

mg

*Á skeltinum stendur "Gratis parkering for Prius ejere"*




*Opel Astra nummar 10 milliónir á verksmiðjuni í Bochum í Týsklandi*

# 10 milliónir Opel Astra

Opel Astra nummar 10 milliónir koyrdi herfyri út av verksmiðjuni í Bochum í Týsklandi. Jubileumsbilurin var ein silvurgráur Opel Astra 1,7 CDTI stationcar.

Fyrsti Astra varð gjørdur tann 12. august 1991.

Opel Astra, sum verður seldur í 80 ymiskum londum kring heimin, hevur fingið nógvar heiðurslønir fyri bæði design og framkomna tøkni.

mg



# Trygdin í evropeiskum tunlum

Tíggjunda árið á rað hevur týski bilfelagsskapinum ADAC, í samstarvi við 19 aðrar evropeiskar bilfelagsskapir, kannað trygdina í yvir 30 av mest týðandi tunlunum til bilferðslu í Evropa.

Sjey av hesum tunlum, harav tríggir í Norra og tríggir í Italia, eru vurderaðir sum sera vánaligir hvat trygd viðvíkur. Næstan triði hvør tunnil er ikki nóg tryggur at koyra í hvat viðvíkur t.d. ljósviðurskiftum, rýmingarvegum og ferðslueftirliti.

Einans 10 tunlar fingu heilt góðan karakter. Besta karakterin fekk tann 1,3 km langi tunnilin "Pont Pla" í høvuðsstaðnum í Andorra.

Ongin danskur tunnil var við í kanningini hjá ADAC.

Kelda: FDM

# Krav at nýta trygdarvestar

Í fleiri evropeiskum londum er tað nú krav at hava trygdarvestar í bilinum.

Um bilurin t.d. steðgar upp, og bilførarin og onnur ferðandi í bilinum mugu fara úr bilinum á alfara vegi, skulu tey kunna síggjast væl av øðrum í ferðsluni.

Tað er eitt sindur ymiskt hvussu strangt tað er, men í nógvum londum fáa bilførarar bót fyri ikki at hava trygdarvestar í bilinum.

Kelda: FDM

*Í fleiri evropeiskum londum er tað nú krav at nýta trygdarvest um bilførarin og onnur ferðandi í bilinum mugu fara úr bilinum á alfara vegi*

